Agenda 21 Stovan

# Kommunufólk á kunningarferð í Íslandi

## við Agenda 21 stovuni

## 28.-31. aug. 2007



*30 fólk frá kommununum luttóku á ferðini. Her eru luttakararnir samlaðir í Stykkishólmi.*

**Kunning um burðardygga menning og Agenda 21 í Íslandi**
Í døgunum 28. –31. august vóru 30 umboð fyri kommunur á kunningarferð í Íslandi. Endamálið við ferðini var at kunna seg um hvussu íslendskar kommunur og kommunalir felagsskapir arbeiða við umhvørvisvernd, Agenda 21 og burðardyggari menning.

Agenda 21 Stovan skipaði fyri ferðini og vóru ymsar útferðir á skránni. M.a. varð vitja hjá umhvørvisdeildini hjá Reykjavíkar kommunu og á endurnýtslumarknaðinum “Góði hirðinn”, sum íslendski renovatiónfelagsskapurin Sorpa drívur. Eisini var vitja á grønum barnagarði og grønum skúla.

Seinasti dagurin á ferðini var nýttur til eina ferð til Stykkishólm á Vesturlandinum har kunnað varð um arbeiðið fyri reinari strandarlinju og burðardyggari ferðavinnu.

**Mikudagur 29. august.**
Hendan dagin vóru vitjanir í Reykjavík á skránni.

Fyrsta vitjanin var á umhvørvisskrivstovuni hjá Reykjavíkar kommunu har greitt varð frá um lokalu Agenda 21 ætlanina hjá kommununi, “Tey 10 grønu stigini”, sum borgarar og politikarar høvdu arbeitt við at fremja. Tey 10 stigini handlaðu m.a. um at fáa fólk at koyra meiri við býarbussunum, at gera súkluteigar í býnum, varðveita náttúru, planta trø og at fáa grønar skúlar og barnagarðar upp at standa.



*Fulltrúi á umhvørvisskrivstovuni greiðir frá um”Tey 10 grønu stigini”.*



*Framløgan fór fram í gamla býráðssalinum í Reykjavík.*

Síðan varð vitja á pumpustøð, sum Reykjavíkar kommuna rekur saman við grannakommunum. Á støðini verður alt kloakk- og spillivatn í høvuðsstaðarøkinum reinsað og síðan pumpað 5,5 km. út á hav.



*Leiðarin á pumpustøðini greiðir frá  hvussu spillivatnið verður reinsa.*



*Eitt av stóru filtrunum, sum eru partur av reinsiskipanini á støðini.*

Seinna vitjanin hendan dagin var hjá renovatiónsfelagsskapinum í høvuðsstaðarøkinum, Sorpa. Vitja varð á endurnýtsluhandlinum "Góði hirðin", sum selur brúkiligar lutir, ið annars vóru tveittir burtur, á staðnum har burturkastið úr høvuðsstaðarøkinum verður tyrvt og á verki, sum ger metangass úr tyrvda ruskinum. Býarbussarnir í Reykjavík koyra allir uppá metan.



*Ragna Halldórsdóttir frá Sorpa greiðir frá hvussu endurnýtslulutirnir verða skildir áðrenn teir fara inn í handilin at verða seldir.*



*Á lagrinum á "Góða hirðanum".*



*So nógv rusk førir okkara nútímans liviháttur til. Ruskdungi á tyrvingarplássinum norðanfyri Reykjavík.*



*Luttakarar kunna seg um hvussu rusk kann blíva til náttúrugass á metan-gassverkinum tætt við tyrvingarplássið.*

**Hósdagur 30. august.**
Hendan dagin varð farið út um Reykjavík við bussi. Vitja var í grønum barnagarði á Kjalarnesi norðanfyri Reykjavík, á íslendsku Agenda 21 stovuni í Borgarnesi á Vesturlandinum, á grønum skúla í Lýsuhól á Snæfellsnesi og í Stykkishólms kommunu har kunning varð um blátt flagg, rein strandarlinja, og um Green Globe merkingarskipanina, burðardygg ferðavinna á Snæfellsnesi.



*Í sirminum hendan morgunin verður greitt frá uttanfyri barnagarðin Kjalarnesi. Bygningurin er bygdur úr náttúruligum tilfarið og nógv verður gjørt burturúr at børnini brúka náttúruna rundanum.*



*Hugnaligt var at koma innum eisini. Ein kaffimuður var at fáa og møguleiki var at heilsa uppá børnini.*



*Í Borgarnesi. Stefán Gíslason, Agenda 21 samskipari í Íslandi, greiðir frá hvussu Agenda 21 arbeiðið í kommununum er skipað.*



*Føroyskir luttakarar á loftinum á Landnámssavninum í Borgarnesi lurta eftir tí sum Stefán Gíslason hevur at greiða frá.*



*Starvsfólk á Agenda 21 stovunum í Íslandi og Føroyum.*
*Frá vinstru: Stefán Gíslason, samskipari í Íslandi,*
*Bergmann Finnsson, Agenda 21 Stovan í Føroyum og*
*Ragnhildur Helga Jónsdóttir, Agenda 21 starvsfólk í Íslandi.*



*Á vitjan á Grøna skúlanum í Lýsuhól. Sveiney, sum var tulkur á ferðini, greiðir frá um vakstarhúsið á skúlanum. Skúlin ger sjálvur streym til vakstarhúsið við vatn- og sólarmegi. Næmingar, lærarar og foreldur hava bygt alt hettar og halda tað viðlíka.*



*Inni í vakstarhúsinum. Trongt, men tó áhugavert.*



*Á áhugaverda Vatnsavninum í Stykkishólmi. Erla Fríðriksdóttir, bæjarstjóri, bjóðar vælkomin vegna kommununa.*



*Thórunn Sigtórsdóttir, umhvørvisfulltrúi í Stykkishólmi og  kommununum á Snæfellnesi, greiddi frá um Blátt flagg og Green Globe og um hvussu kommunurnar í økinum skipa arbeiðið at liva upp til hesar altjóða merkingar-skipanir.*



*Útsýni yvir Stykkishólm.*